**HOYVÍKAR SKÚLI**

<u>**Skúlastýrisfundur**</u>

Hósdagur, 04. apríl 2024 kl. 16.30 – 18.00

**Á fundinum vóru:** Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila í Hentze, Kristianna W. Poulsen, Gunnvør Balle Leivur Simonsen, Anna Maria Reinert Jensen, og Malan á Dul Nielsen

**Fundarleiðari:** Rannvá Mortansdóttir

**Skrivari:** Malan á Dul Nielsen

**Skrá:**

1. Fundarfrásøgnin frá seinast verður góðkend til næstu ferð saman við hesari.

2. Leiðslan kunnar, m.a. um hesi viðurskifti:

- Frídagar 24/25: Vit hava gjørt eina spurnarkanning um frídagarnar, og nærum helvtin valdi 2. og 3. januar. Skúlastýrið heldur hetta vera eitt gott hugskot.
- Arbeiðsdagar 24/25: Vit skulu sjálvi leggja tveir ráðleggingardagar, og skúlastýrið verður kunnað um tað, tá lærararnir hava fingið kunning og valt tveir dagar.
- Bøurin omanfyri skúlan: Vit hava fingið játtað at spæla á bønum omanfyri, vit hava sett garðvaktir á. Kommunan hevur lovað at hegna trøini inni, sum eru plantað, so tey fáa frið.
- Hýsing av Hoyvíkar Skúla, ímeðan umbygging verður. Vit hava verið í dialog við kommununa um møblakeyp, sum vit helst skulu kunna taka við okkum í ein eventuellan nýggjan skúla. Vit hava spurt, hvar vit kunnu hýsast, meðan ein umbygging fer fram. Hoydalar er tað einasta alternativið. Um tað ikki letur seg gera at fara oman har, so er ein møguleiki at leiga pavilliongir at hýsast í, meðan bygt verður.
- Ukrainar í skúla: Av tí, at vit hava pláss til næmingar í fleiri árgangum kann roknast við, at vit fáa nakrar ukrainar í onkran av flokkunum eftir summarsteðgin.
- Fundur við kommununa um, hvussu vit taka væl ímóti 1. flokki, komandi. Vit hava biðið um fund um næmingar við serligum tørvi. So skal tørvurin lýsast, og so skulu vit finna høli.

3. Tiltak/foreldrafundur við SSP um talgildan harðskap og grooming. Hetta er ógvuliga aktuelt í løtuni, og tí er tað eitt gott hugskot at hava eitt tílíkt tiltak. Vit kanna møguleikan at hava tiltakið 24. apríl.

4. Lobbbyarbeiði í mun til at skunda undir umbygging, nú val stendur fyri framman. Hetta er ov tungt, tí her hendir absolut einki. Vit mugu fáa foreldrini við upp á banan

og tosa hart um, hvussu ringum standi skúlin er í. Skúlin hevur gjørt vart við hjá kommununi, at skúlaárið 2025/2026 fara vit at mangla 3 stovur. Vit kundu hugsað okkum forskúla av ymsum orsøkum, men hava ikki umstøður til tað, sum er.

5. Nýtt frá kommununi um skúlabygging: Har er einki nýtt. Vit skulu hava eina prognosu um næmingatal, so vit vita, um skúlin skal vera 2. spor ella 3. spor. Tey tølini eru ikki tillutað, so politikkararnir fáa tikið eina avgerð. Vissi Hoyvíkar skúli ikki fær hýsing nakra aðra staðni, jamen so má nýggjur skúli byggjast aðra staðni. Hetta skal umsitingin eisini taka støðu til, áðrenn politikkararnir fáa tikið avgerð. Vit halda annars ikki, at mann kann blíva við at brúka hesar undanførðslurnar, tí vit mugu fáa ein nýggjan skúla.

Vit kundu hugsað okkum at brúkt Hoyvíkshøllina til royndar/próvtøkustað.
Fíggjarætlanin skal leggjast fram næstu ferð.

6. Annað:

- Fíggjarætlanin skal leggjast fram næstu ferð.
- Skal skúlin gera eina trivnaðarkanning? Er áhugi fyri at gera eina trivnaðarkanning millum starvsfólk og næmingar?
  Í løtuni tykist tað ikki at vera tørvur á tí. Mett verður ikki, at tað gagnar starvsfólkum ella næmingum í nóg stóran mun í mun til kostnaðin.
- Hvussu við flokkum, sum ikki fungera væl?
  Har ber til at melda ein flokk til Sernám. Tað hava vit sett orð á ídag. Tað merkir, at vit kunnu fáa Sernám sum ráðgeva inn í ein flokk, har mann metir tørv vera á.
- Hvat ger mann við happing?
  Spurningurin er, um mann sær happing, tí tað fyrigongur í ein stóran mun á alnótini, men tað er at kalla ein spaka fyri ein spaka.
- Sosiala deild kemur niðan til ráðgeving, so mann kann spyrja um ymiskt. Eisini um tað, sum ikki blívur til eitt mál.
- Allir lærarar eru ikki líka fortróligir við støðuna um at siga frá. Hvørki við foreldrini ella sosialu deild. Foreldrasamstarvið tyngir lærarasamstarvið mest.
- Einki nýtt um fótbóltsvøllin.

Avtalað er, at vit eta saman næstu ferð - 1. mai.

Avtalað er, at skúlastýrið møtist aftur 1. mai 2024

Fundurin lokin kl. 18:18